# Skal koma skálafólki til góðar

**Føroya Banki hevur selt deildarbygningin á Skála til Runavíkar kommunu. Virksemi skal sum skjótast fáast aftur í bygningin**

KOMMUNUR
Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

Á fundi á Skála mánadagin undirskrivaðu Runavíkar kommuna og Føroya Banki avtalu um, at Runavíkar Kommuna keypir deildarbygningin hjá Føroya Banka á Skála.

Føroya Banki hevur áður boðað frá, at avgreiðsludeildin á Skála, sum hevur verið opin hálva tíð, varðafturlatin í gjár 1. februar.

Ístaðin letur bankin upp nýumbygda deild á Strondum, sum verður opin fulla tíð við fullari tænastuveiting og fimm starvsfólkum.

## Virksemi sum skjótast

Nú, ið bankin letur aftur, metir Runavíkar Kommuna, at tað er umráðandi, at virksemi sum skjótast aftur kann fáast í bygningin.

Runavíkar Kommuna hevur vent sær til bankan við fyrispurningi um at ogna sær bygningin. Kommunan hevur ikki enn avgjørt, hvat virksemi skal vera í bygninginum

– Men málið er, at hann skal nýtast til eitthvørt, ið kemur bygdini og fólkinum til góðar, sigur Rodmundur Nielsen.

Á býráðsfundi hósdagin í farnu viku samtykti býráðið at keypa bygningin, og mánadagin varð so avtalan um søluna undirskrivað av Rodmundi Nielsen, býraðsformanni og Janus Petersen, bankastjóra.



*Teir báðir stjórarnir, Janus Petersen (vm.) í Føroya Banka og Rodmundur Nielsen (hm.) í Runavíkar kommunu hava júst undirskrivað sáttmálan um bygningin á Skála. Enn er ikki avgjørt, hvat bygningurin skal brúkast til*

# Ógreitt við Hetlandsflúgving

**Sambært hetlendska blaðnum The Shetland News fer Atlantsflog at flúgva tvær ferðir um vikuna millum Føroyar Hetland og London eftir páskir næsta ár. Stjórin á Atlantsflogi sigur, at eingin avgerð er tikin um tað**

FLOGFERÐSLA
Edvard Joensen




*Kent Christensen, sølu- og marknaðarleiðari hjá Atlantsflogi, sigur fyri The Shetland News, at Atlantsflog fer at flúgva til Hetlands á veg úr Vágum til London*

*Mynd: Edvard Joensen*

Ætlanin hjá Atlantsflogi um at knýta Hetland upp í rutuna millum Vágar og London verður veruleiki eftir páskir næsta ár, veit hetlendska blaðið The Shetlands News at siga frá sølu- og marknaðarleiðararnum í Atlantsflogi, Kent Christensen.

Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi, sigur í viðmerking við Sosialin, at tað man hetlendska blaðið hava yvirtulkað eitt sindur, tí hóast ætlanin er gomul, er einki avgjørt enn.

Ætlanin um at knýta Hetland upp í rutunetið hjá Atlantsflogi, er ikki nýggj.

Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, hevur fyrr sagt við Sosialin, at arbeitt hevur verið við ætlanini, men at hon er útsett nakað, orsakað av teimum umstøðum, sum nú eru á Danmarkarrutuni, har Atlantsflog nú er einsamalt um at flyta øll ferðafólkini. Tað bindur felagið nakað, segði Magni Arge.

Stjórin í hetlendska ferðaráðnum, Andy Steven, segði við Sosialin á West-Norden Travel Mart stevnuni í Íslandi í september í fjør, at Hetlendingar settu stórar vónir til eina flogrutu millum Hetland og London, og at teir væntaðu, at Atlantsflog fór undir rutuna.

Tá váttaði Magni Arge, at felagið arbeiddi við hesi ætlan, men at tað, at Maersk Air gavst at flúgva til Føroya, og Atlantsflog tí einsamalt skuldi flyta øll ferðafólkini á Danmarkarrutuni, gjørdi, at ætlanin varð seinkað nakað. Eisini vóru hetlendingar farnir undir at umvæla flogvøllin í Sumburgh.

Í hetlendska blaðnum The Shetland News tann 1. feburar, verður sagt, frá Kent Christensen, sølu- og marknaðarleiðari hjá Atlantsflogi, at farið verður undir flúgving millum Vágar, Sumburgh og Stansted eftir páskir 2006, og at tað ætlandi verður flogið tvær ferðir um vikuna.

Sambært heltlendska blaðnum fegnast hetlendingar um ætlaðu nýggju flogrutuna, sum fer at gera tað møguligt hjá teimum at koma til London upp á hálvanannan tíma, og eisini fer at styrkja um bondini til grannarnar fyri norðan.

Hóast tað skilst á The Shetland News, at ein avgerð er tikin, leggur Magni Arge dent á, at tað er tað ikki. Men ætlanin er avgjørt áhugaverd, sigur hann.

# Bíðar eftir Framtaksgrunninum

**Smyril Line bíðar eftir svari frá Framtaksgrunninum og íslendsku partaeigarunum, sum enn ikki hava gjørt av, um teir fara at hække partapeningin i felagnum**

FERÐAVINNA
Edvard Joensen




*Norröna fer at sigla á síni gomlu rutu í hvussu er, til summarsiglingin endar í september, staðfestir Klæmint Weihe, nevndarformaður í Smyril Line*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Leiðslan í Smyril Line bíðar eftir, at Framtaksgrunnurin og íslendsku partaeigararnir í felagnum fara at gera av, um teir skulu hækka partapeningin í Smyril Line. Men tann støðan ávirkar ikki siglingina hjá Norrönu í vár og í summar. Hon verður eftir løgdu ferðaætlanini.

Klæmint Weihe, nevndarformaður i Smyril Line sigur, nú er leiðslan bara í bíðistøðu, til íslendingar og Framtakasgrunnurin hava sagt frá, hvat teir fara at gera í málinum um hækkaða partapeningin.

Um ætlaða samstarvið við norska felagið Fjord Line, sigur hann, at har ganga samráðingarnar sína heilt vanligu gongd, og eingin avgerð er tikin enn um nakað sum helst.

Tó váttar hann, at Norröna fer at halda fram við síni sigling í Norðuratlantshavi, akkurát sum hon higartil hevur gjørt. Og tað er eingin grund hjá nøkrum at vænta, at hon knappliga verður tikin úr rutu. Hon heldur fram eftir feðraætlanini í hvussu er til summarferðaætlanin er liðug í september, sigur hann.

– Hetta nógva tosið um, at Norröna kanska siglir hesa vikuna og kanska ikki í næstu viku, er sera óheppið, sigur nevndarformaðurin í Smyril Line. Tað ger fólk ótrygg, sigur hann.

Men hann ger púra greitt, at Norröna verður at síggja á okkara leiðum í hvussu er, til sumamrsiglingin er av í september.